FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

# Innihald


Inngangur ....................................................................................2
Lýsing av búskaparstøðu og verandi gongd ...................................3
Altjóða bakgrund ...........................................................................8
Almenn fíggjarmál .........................................................................9
Fíggjarlógaruppskotið 2014 ..........................................................12
Broyttar fyritreytir ........................................................................12
Raðfestingar .................................................................................12
Nýggjar inntøkur ...........................................................................13
Inntøkur landskassans í 2014 ........................................................13
Útreiðslur landskassans í 2014 ......................................................14
Løgur í 2014 ...................................................................................14
Játtanareftirlit í fíggjarárinum 2013 .............................................16
Rakstrarjáttanareftirlit ..................................................................19
§ 1 Løgtingið ...................................................................................19
§ 2 Løgmansfyrisitingin ....................................................................19
§ 3 Fíggjarmál ..................................................................................20
§ 5 Fiskivinnumál ..............................................................................22
§ 6 Vinnumál ....................................................................................23
§ 7 Mentamál ....................................................................................24
§ 11 Heilsumál ..................................................................................25
§ 12 Almannamál ..............................................................................27
§ 15 Innlendismál ..............................................................................28
§ 20 Inntøkur ....................................................................................30
Løgujáttanareftirlit .........................................................................32



Kvíggjartún 1 • Box 2039 • FO-165 Argir
☏ (+298) 35 20 20 • 🖷 (+298) 35 20 25 • fmr@fmr.fo • www.fmr.fo

# Inngangur

Sambært § 9 í løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan skal landsstýrismaðurin við fíggjarmálum, samstundis sum fíggjarlógaruppskotið verður lagt fram, leggja fram frágreiðing (Búskaparfrágreiðing II), sum gjølligari lýsir og metir um innihaldið í fíggjarlógaruppskotinum og greiðir frá játtanareftirlitinum í fíggjarárinum.

Fíggjarlógaruppskotið fyri 2014 er grundað á uppskotið til játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2014, sum varð lagt fram í løgtinginum 26. mars í ár (løgtingsmál nr. 146/2012). Framrokningar av inntøkum og útreiðslum eru gjørdar av nýggjum, umframt at umraðfestingar eru gjørdar á summum økjum, sum eisini er orsøkin til, at frávik eru frá upprunaligu samtyktu játtanarkarmunum fyri 2014.

Stórur partur av inntøkusíðuni á fíggjarlógini er skattir og avgjøld, sum verða stýrd av búskaparligu konjunkturgongdini í samfelagnum. Inntøkusíðan er tí fyri stóran part grundað á óvissar metingar um framtíðar búskapargongd. Útreiðslusíðan er í so máta lættari at meta um, tí størsti parturin av útreiðslunum er grundaður á politiskar raðfestingar av tænastum og veitingum, sum almennu Føroyar skulu bjóða.

Óvissur eru sjálvsagt eisini á útreiðslusíðuni, eins og tað eisini verða framdar raðfestingar og tiltøk á inntøkusíðuni, t.d. við tillagingum av skattum, avgjøldum og inntøkugrundarlagi, men óvissan er kortini altíð nógv størri á inntøkusíðuni. Óvissan á útreiðslusíðuni snýr seg serliga um gongdina í rentum, gongdina í oljuprísum og um úrslitini av lønarsamráðingunum á almenna arbeiðsmarknaðinum.

Við so óvissum fyritreytum er tað ein stór búskaparpolitisk avbjóðing at stýra eftir einum máli at fáa hallið á fíggjarlógini burtur í 2016. Til ber at gera forsagnir, har ið roynt verður at meta um búskaparvøkstur í nærmastu framtíð, men eingin er førur fyri at spáa um búskaparvøksturin fleiri ár fram í tíðina. Tí skulu metingarnar av inntøkum landskassans fleiri ár frameftir lesast við fyrivarni.

Ein onnur búskaparpolitisk avbjóðing er, at tiltøk, sum skulu minka um hallið á fíggjarlógini, kunnu virka tálmandi á búskaparvøksturin og tí eisini á inntøkur landskassans. Tiltøk, sum skerja útreiðslur landskassans, ella tiltøk, ið økja skattainntøkurnar, kunnu minka eftirspurningin í samfelagsbúskapinum og tí eisini í ein ávísan mun bæði búskaparvøkstur og inntøkur landskassans.

Inntøkurnar í uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2014 eru framroknaðar við støði í søguligum inntøkutølum og teimum fyritreytum, sum eru kendar í løtuni. Vanligur landsskattur og meirvirðisgjald umboða umleið 65% av samlaðu inntøkum landskassans og hava tí stóran týdning fyri samlaðu inntøkurnar hjá landskassanum.

Sum grundarlag fyri metingum fyri búskaparvøksturin komandi árini verða brúkt søgulig tøl, vitan um búskapargongdina seinastu árini og vitan um gongdina innan ymisk tjóðarbúskaparlig vísitøl. Eisini verða forsagnir hjá Búskaparráðnum brúktar sum partur av grundarlagnum fyri at meta um búskaparvøksturin. Eisini skal viðmerkjast, at serlig viðurskifti, t.d. í ávísum vinnugreinum, eru

tikin við í grundarlagið fyri framrokningunum. Í fyritreytunum fyri 2014 verður vøksturin í BTÚ mettur til umleið 3% (ársins prísir). Hesar metingar samsvara væl við nýggjastu metingarnar, sum Búskaparráðið eru komið við.

Skattir, ið eru grundaðir á inntøku og nýtslu (t.d. vanligur landsskattur og MVG), verða í fyritreytunum settir at fylgja sama vøkstri sum BTÚ, t.e. umleið 3%, tó so, at á teimum inntøkujáttanum, har tað verður mett neyðugt, eru gjørdar serligar metingar út frá fyritreytunum fyri játtanina.

Fyritreytirnar fyri rentuframskrivingunum eru metta gongdin í vaksandi landskassaskuldini og útlitini fyri rentugongdina.

Frágreiðingin er sett soleiðis saman, at fyrst er stutt lýsing av gongdini í føroyska búskapinum og í altjóða búskapinum. Síðan er ein lýsing av fíggjarlógaruppskotinum fyri 2014. At enda er ein frágreiðing um játtanarligu støðuna í ár, samanlagt og fyri hvørja grein sær. Her eru bara tiknar við tær rakstrar- og løgujáttanir, sum mettar fara at víkja frá upprunaligu játtanini, tá ið árið er farið.

## Lýsing av búskaparstøðu og verandi gongd

Fíggjarmálaráðið metir, at føroyski búskapurin, BTÚ, veksur umleið 3% í ársins prísum bæði árini 2013 og 2014. Í 2012 vaks BTÚ umleið 2% sambært bráðfeingisuppgerð frá Hagstovu Føroya. Inntøkumetingar í fíggjarlógaruppskotinum byggja tí í flestu førum á, at vøksturin verður umleið 3% í 2013 og 2014. Í játtanarkørmunum fram til 2018 verður eisini roknað við árligum vøkstri í BTÚ á 3%. Mynd 1 vísir gongdina í BTÚ síðsta árini og væntaðu gongdina næstu árini.

Mynd 1

Bruttotjóðarúrtøka í ársins prísum og árlig broyting í %, 1998-2012




Kelda: Hagstovan. Sett upp: Fíggjarmálaráðið.

Eins og í undanfarnum metingum, stavar vøksturin í BTÚ frá, at framleiðslan í ali- og uppsjóvarvinnuni kann væntast at vaksa nakað. Harafturat verður roknað við, at privata nýtslan og privatar íløgur, sum í løtuni eru á lágum stigi, fara at vaksa, sum frá líður, og at hetta fer at geva eitt ávíst ískoyti til búskaparvøksturin. Av tí at bróðurparturin av privatu nýtsluni í Føroyum er vendur móti innfluttum vørum, verður ískoytið til búskaparvøksturin frá meira nýtslu helst avmarkað. Tað hevði óivað virkað meira stimbrandi á føroyska búskapin, um útboðið av arbeiðsmegi hevði vaksið ella um tilflytingin til Føroyar hevði vaksið.

Fiskiskapurin á heimligu leiðunum er framvegis sera vánaligur (her verður serliga hugsað um fiskiskap eftir botnfiski á Landgrunninum). Sannlíkt verður ískoytið til búskaparvøksturin frá hesi vinnuni og frá atknýttu fiskavirkisvinnuni á landi lítið og avmarkað næstu árini. Hinvegin er gongdin framvegis sera góð innan uppsjóvarvinnuna og alivinnuna, og væntað verður, at størsta ískoytið til vøksturin næstu árini verður frá hesum báðum vinnunum. Tað almenna fer mest sannlíkt at virka neutralt ella eitt vet stimbrandi á eftirspurningin og samfelagsbúskapin sum heild næstu tvey árini.

*Størri óvissa enn vanligt um gongdina í BTÚ*

Stór óvissa er framvegis um gongdina í BTÚ. Umstøðurnar á altjóða fíggjarmarknaðum eru óstøðugar, hóast viðurskiftini eru batnað síðsta árið ella so orsakað av umfatandi stuðulstiltøkum frá miðbankum. Metingarnar frá Fíggjarmálaráðnum um gongdina í BTÚ næstu tvey árini eru grundaðar á, at føroyski búskapurin ikki verður fyri stórum og óvæntaðum stoytum uttaneftir.

Ein óvissa, sum eigur at verða nevnd, er óvissan kring fiskiskapin eftir uppsjóvarfiski næstu árini, umframt at ES hevur sett handilstiltøk í verk móti Føroyum. Ein onnur óvissa er um búskaparstøðuna í Evropa sum heild og ta kreppustøðu, sum fleiri lond í Suður- og Eysturevropa eru í. Í fleiri londum er arbeiðsloysið somikið høgt (í fleiri londum er arbeiðsloysið umleið 50% millum ung), at vandi er fyri álvarsligum politiskum og sosialum ófriði.

*Framgongd í fleiri týðandi vísitølum*

Framgongd sæst framvegis í týðandi vísitølum fyri føroyska búskapin. Arbeiðsloysið er lækkandi og varð skrásett til 4,4% í august mánaði. Tá ið arbeiðsloysið var hægst við ársbyrjan 2011, var tað omanfyri 7%. Talið á løntakarum er vaksið síðani miðskeiðis í 2011, tó at vøksturin er hæsaður av higartil í ár. Myndirnar 2 og 3 vísir gongdina í arbeiðsloysinum og í talinum á løntakarum síðani ársbyrjan 2008.

**Mynd 2**

**Árstíðarjavnaðir løntakarar í tali og árstíðarjavnað arbeiðsloysi í %, jan-1985 til jun-2013**




Kelda: Hagstovan. Sett upp: Fíggjarmálaráðið.

Fólkaflytingin av landinum var minni í 2012 sammett við undanfarin ár. Netto fluttu umleið 300 fólk av landinum í 2012 sammett við umleið 400 fólk í 2011. Tøl fyri fyrra hálvár í ár vísa, at flytingin av landinum er minkað nakað í ár, meðan flytingin til landið er vaksin nakað. Á mynd 3 síggjast til- og fráflyting úr Føroyum býtt á mánaðir síðani 2007. Av mynd 2 sæst, at minkingin í

talinum av løntakarum, sum byrjaði í 2008, er steðgað í 2011, og at løntakaratalið er hækkað samanlagt síðani 2011.

**Mynd 3**

**Fólk flutt til og úr Føroyum, jan-2007 til juni-2013**




Kelda: Hagstovan. Sett upp: Fíggjarmálaráðið.

Myndirnar 3 og 4 vísa gongdina í fólkaflytingini til og úr Føroyum síðstu árini. Fyri haldførið á fíggjarpolitikkinum í Føroyum – serliga sæð yvir longri áramál – er tað framvegis ein stór avbjóðing, at arbeiðsfør fólk flytur av landinum. Í hesum sambandi kann verða víst til frágreiðing frá Búskaparráðnum frá september 2013, har ið hugtakið *haldføri* varð lýst. Verður hugt eftir august mánaði í mynd 3, gevur hetta eina mynd av, hvør størsta einstaka orsøkin er til fólkafráflytingina úr Føroyum. Í august mánað flyta tey, sum fara av landinum at útbúgva seg vanliga adressu, og síðstu árini eru umleið 600 fólk flutt av landinum bara hendan mánaðin.

**Talva 1. Lønir í høvuðsvinnugreinum, januar-august, 2010-2013, mió. kr.**

| *Vinnugrein* | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | Munur 2012-13 | Munur í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiski-, ali- o.o. ráevnisvinna | 781 | 796 | 853 | 830 | -23 | -2,6 |
| Byggivinna o.o. tilvirking | 532 | 539 | 553 | 539 | -14 | -2,5 |
| Privatar tænastuvinnur | 1.488 | 1.463 | 1.547 | 1.557 | 10 | 0,6 |
| Almenn o.o. tænasta | 1.664 | 1.684 | 1.697 | 1.749 | 52 | 3,1 |
| Lønargjaldingar tilsamans | 4.464 | 4.482 | 4.649 | 4.675 | 26 | 0,6 |

*Kelda: Hagstova Føroya.*

Gongdin í lønargjaldingum býtt á vinnugreinar (talva 1 og mynd 5) vísir, at ávísar vinnur eru í vøkstri, meðan aðrar vinnur standa seg verri, og summar vinnur eru í beinleiðis minking. Mestsum allur vøksturin í samlaðu lønargjaldingunum stavar frá, at lønargjaldingarnar vaksa í almennu tænastuvinnunum. Her eigur at verða nevnt, at verkfall var á almenna arbeiðsmarknaðinum í 2012, sum ávirkar tølini fyri 2013. Mynd 5 vísir gongdina í lønargjaldingum síðstu árini.

Mynd 4

Broytingar í fólkatalinum, 1970 til 2012




Kelda: Hagstovan. Sett upp: Fíggjarmálaráðið.

Mynd 5

Lønargjaldingar í mió. kr. býtt á høvuðsvinnugreinar og BTÚ í mió. kr., 2004Q1 til 2013Q2




Kelda: Hagstovan. Sett upp: Fíggjarmálaráðið.

Nýggjasta uppgerðin av konjunkturvísitalinum (treystitalinum) hjá Fíggjarmálaráðnum vísir, at føroyskt vinnulív er vorðið meira bjartskygt um framtíðina (mynd 6). Kanningin varð gjørd í juni mánaði í ár. Samlaða vísitalið vaks úr 16 til 32, sum er hægsta talið, ið er skrásett síðani juni 2007. Vísitalið gevur eina ábending um, hvussu vinna og brúkarar meta um støðuna beint nú, seinastu tólv mánaðirnar og vánirnar um næstu tólv mánaðirnar.

**Mynd 6**

**Konjunkturvísital fyri brúkarar og vinnu tilsamans**




Kelda: Fíggjarmálaráðið.

Samlaða vísitalið hækkar av, at vinnulívið er blivið meira bjartskygt um framtíðina, meðan føroysk húsarhald svara at kalla óbroytt sammett við síðstu kanning í januar mánaði. Samlaða vísitalið hækkar fyri allar vinnubólkar, bæði teir, sum eru treytaðir av innlendskum eftirspurningi og tilfeingisvinnur, sum í stóran mun útflyta vørur til útlond.

*Viðurskifti við útlond*

Síðstu árini hevur stórt avlop verið á føroyska gjaldsjavnanum. Avlopini stava í mestan mun frá, at lønarinntøkur til føroyingar, sum arbeiða uttanfyri Føroyar, eru vaksnar nógv. Á handilsjavnanum hava hinvegin verið hall síðstu mongu árini, sæð burturfrá 2011 og 2010. Føroyski handilsjavnin sveiggjar nógv alt eftir privatari nýtslu, olju- og fiskaprísum og prísunum á alifiski. Føroyski innflutningurin av brennievni er umleið 10% av BTÚ. Til sammetingar innflyta danir og íslendingar fyri ávikavist 3 og 5% av BTÚ í brennievni.

Orsakað av, at so stórar lønarinntøkur og rakstrarflytingar eru til landið uttaneftir, er ikki óvæntað, at stórt hall samstundis er á handilsjavnanum. Myndirnar 7 og 8 vísa føroyska handils- og gjaldsjavnan.

**Mynd 7**

**Innflutningur og útflutningur, mió. kr., 1988 til 2012**




Viðm.: Handilsjavnin fevnir bara um vørur.
Kelda: Hagstovan. Sett upp: Fíggjarmálaráðið.

Mynd 8

Rakstrarviðskifti gjaldsjavnans í mió. kr., 1998-2011




Kelda: Hagstovan. Sett upp: Fíggjarmálaráðið.

## Altjóða bakgrund

Greitt er, at gongdin í altjóða búskapinum og tey sveiggj, sum altjóða búskapurin er fyri, eisini fáa stóra ávirkan á føroyska búskapin. Í fyrra lagi tí at meginparturin av framleiðsluni í Føroyum verður seldur á marknaðum í Evropa, Stóra Bretlandi, Ásia og Norðuramerika. Keypiorkan á hesum marknaðum er avgerandi fyri teir prísir, sum til ber at selja fiskavørur og aðrar vørur fyri á hesum marknaðum. Í øðrum lagi innflyta vit nógva olju til Føroyar. Prísurin á olju ávirkast nógv ávirkaður av gongdini í altjóða búskapinum. Sæð yvir styttri tíðarskeið, kann búskaparliga virksemið í Føroyum og aðrastaðni verða nógv ávirkað av broytingum í oljuprísum.

Í stuttum kunnu vit siga, at framgongd er í menningarlondum og lutvíst eisini í amerikanska búskapinum, meðan búskapurin í Evropa stendur í stað. Heimsbúskapurin er í løtuni sundurbýttur. Vøksturin í menningarlondum er um 5% um árið, í USA um 2%, og í Evropa er afturgongd á umleið 0,5% um árið. Nýggj vísitøl úr Evropa vísa tó, at vøksturin annan ársfjórðing í ár er hækkaður nakað til umleið 0,3% sammett við fyrsta ársfjórðing í ár, og at vøksturin serliga er hækkaður í Týsklandi og í Fraklandi. Í talvu 2 síggjast metingar frá IMF um vøkstur í BTÚ í føstum prísum næstu árini.

**Talva 2. Árligur vøkstur í BTÚ 2010-2014 býtt á øki**

| *% um árið í føstum prísum* | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|
| USA | 2,4 | 1,8 | 2,2 | 1,7 | 2,7 |
| Evruøkið | 2,0 | 1,5 | -0,6 | -0,6 | 0,9 |
| Stóra Bretland | 1,8 | 1,0 | 0,3 | 0,9 | 1,5 |
| Ídnaðarlond | 3,0 | 1,7 | 1,2 | 1,2 | 2,1 |
| Menningarlond | 7,6 | 6,2 | 4,9 | 5,0 | 5,4 |
| Heimsbúskapurin | 5,2 | 3,9 | 3,1 | 3,1 | 3,8 |

*Kelda: IMF World Economic Outlook Update, 9. juli 2013.*

Munurin í vøkstri sæst eisini aftur í arbeiðsloysistølunum. Í USA er arbeiðsloysið minkað úr 10% í 2010 til umleið 7½% nú. Í Evropa er arbeiðsloysið støðugt hækkað til umleið 12% nú.

Arbeiðsloysið hevur rakt ung serliga hart. Orsakað av lága búskaparvøkstrinum, sum er væntaður í Evropa næstu árini, kann eisini væntast, at arbeiðsloysið verður varandi høgt í fleiri ár frameftir.

Síðsta árið hava miðbankar sett í verk umfatandi stuðulstiltøk bæði fyri at minka um ótryggleikan á fíggjarmarknaðum og fyri at stuðla undir búskapin og minka arbeiðsloysið. Tiltøkini, sum hava verið óvanlig, umfatandi og lutvíst óvæntað, hava minkað munandi um vandan fyri, at samstarvið um felagsgjaldoyrað í Evropa verður slitið, óivað við ógvusligum avleiðingum fyri alt Evropa.

Stuðulstiltøkini fevna bæði um at lækka pengapolitiskar rentur til eitt søguliga lágt støði og um stór uppkeyp av ríkis-, virkis- og realkredittlánsbrøvum við stuttari og langari gildistíð. Síðsta stóra átakið var, tá ið japanski miðbankin í apríl í ár óvæntað fráboðaði, at hann fór undir pengapolitisk stuðulstiltøk undir nýggjum regluverki, sum einki fordømi hevur.

Eitt endamál við tiltøkunum frá miðbankum er at stimbra eftirspurningin eftir lánum og at mótvirka, at lánveitingar í peningastovnum verða táttaðar. Í Evropa eru lánveitingar táttaðar munandi serliga innan vinnulán síðsta árið, meðan lánveitingar hava verið meira støðugar aðrastaðni. Samstundis er eftirspurningurin eftir nýggjum privatum lánum lítil bæði í Evropa og aðrastaðni í Vesturheiminum.

Partabrævamarknaðir eru óivað nógv ávirkaðir av stuðulstiltøkunum frá miðbankum. Hóast arbeiðsloysið framvegis er høgt í USA og søguliga høgt í fleiri londum í Evropa, eru flestu partabrævavísitøl hækkað nógv síðsta árið ella so. Flestu vísitøl fyri partabrøv í Vesturheiminum eru nú á áleið sama stigi sum undan kreppuna. Fleiri partabrævavísitøl eru enntá hægri sammett við undan kreppuna.

## Almenn fíggjarmál

Her verður stutt hugt eftir gongdini í rakstrinum hjá landskassanum síðstu árini. Mynd 9 vísir gongdina í inntøkum og útreiðslum hjá landskassanum og RLÚ-úrslit síðani 1997 við játtanartølum fyri 2013.

Mynd 9

Úrslit landskassans, mió. kr., 1997 til 2013




Viðm.: Tølini fram til 2012 eru roknskapartøl. *Tølini fyri 2013 eru játtanartøl.
Kelda: Gjaldstovan og Hagstovan. Sett upp: Fíggjarmálaráðið.

Á myndini sæst týðuliga, at inntøkurnar tilsamans ávirkast meira av búskapargongdini og serliga av konjunkturgongdini sammett við útreiðslurnar. Mynd 10 vísir gongdina í bruttoskuld og innistandandi hjá landsstýrinum. Gongdin síðstu árini, har ið inntøkurnar hjá landskassanum frá skattum og avgjøldum ikki eru vaksnar í sama mun sum útreiðslurnar, hevur givið eina verri javnvág millum inntøkur og útreiðslur hjá landinum, sum sæst aftur í mynd 10 sum vaksandi bruttoskuld.

**Mynd 10**

**Landskassans bruttoskuld og innistandandi í mió. kr. og % av BTÚ, 1997 til 2012**




Kelda: Gjaldstovan. Sett upp: Fíggjarmálaráðið.

At landskassin hevur havt hall síðstu árini sæst aftur í mynd 10 sum vaksandi bruttoskuld, tí at hallið í landskassanum verður fíggjað við lántøku. Enn hevur landið ikki nógva skuld sammett við flest onnur lond í Vesturheiminum, men kortini er greitt, at inntøkur og útreiðslur hjá landinum skulu javnviga sæð yvir longri áramál, tá ið atlit eisini eru tikin at ávirkanini frá konjunkturunum. Gera tær ikki tað, er rikni fíggjarpolitikkurin ikki haldførur yvir longri áramál, við tað at skuldin tá vil halda áfram at vaksa.

Fyri haldførið á fíggjarpolitikkinum hevur tað størri týdning, at bruttoskuldin yvir longri áramál ikki veksur skjótari enn samlaðu inntøkurnar í samfelagnum. Hetta merkir at bruttoskuld í % av BTÚ skal helst ikki vera støðugt vaksandi, tá ið atlit eisini eru tikin at konjunkturstøðuni. Fyri smærri samfeløg kann ein ávísur váði vera knýttur at tí at endurfíggja almenna skuld á lánsbrævamarknaðinum á hvørjum ári, um rikni búskapar- og fíggjarpolitikkurin ikki er haldførur. Grundraksturin hjá landskassanum er batnaður síðstu árini, sum víst verður á í talvu 3 niðanfyri.

**Talva 3. Úrslit av landskassans grundrakstri**

| *mió. kr.* | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|
| Landskassans grundrakstur | -361 | -130 | -121 | -67 | 66 |

*Kelda: Fíggjarmálaráðið.*

Grundraksturin er vanligur rakstur frádrigið allar fíggjarpostar, t.e. løgur, rentuútreiðslur, rentuinntøkur, inntøkur frá vinningsbýti og aðrar serinntøkur.

Mynd 11

Rakstrarinntøkur og rakstrarútreiðslur landskassans, mia. kr., 1997 til 2016




Viðm.: Myndin vísir inntøkur og útreiðslur landskassans frádrigið allar fíggjarpostar, t.e. løgur, rentur, inntøkur frá vinningsbýti og aðrar serinntøkur.
Kelda: Fíggjarmálaráðið.

## Fíggjarlógaruppskotið 2014

Fíggjarlógaruppskotið fyri 2014 tekur støði í teimum játtanarkarmum, sum Løgtingið samtykti í mai í ár. Broytingar eru í uppskotinum samanborið við játtanarkarmarnar, av tí at fyritreytir eru broyttar bæði fyri inntøkur og útreiðslur, umframt at umraðfest er á summum økjum.

Talvan niðanfyri vísir RLÚ-úrslitið fyri árini 2014 til 2016 í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2014 samanborið við samtykta uppskotið til játtanarkarmar 2014.

**Fíggjarlógaruppskot 2014 samanborið við játtanarkarmar fyri 2014**

| *Mió. kr.* | **2014** | **2015** | **2016** |
|---|---|---|---|
| RLÚ-úrslit í samtyktu játtanarkørmunum 2014 | -235 | -168 | 3 |
| RLÚ-úrslit í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2014 | -250 | -199 | -75 |

### Broyttar fyritreytir

Høvuðsbroytingarnar frá karmauppskotinum 2014 til fíggjarlógaruppskotið 2014 eru hesar:

- Metingin og játtanin til stuðul til rentuútreiðslur er lækkað
- Samgongan hevur slept ætlanunum um at skerja túratalið og hækka ferðaseðlakostnaðin á leiðunum hjá Strandfaraskipum Landsins.

### Raðfestingar

Av raðfestingum í fíggjarlógaruppskotinum 2014 kunnu nevnast:

- Hægri játtan til eldraøkið
- Økini serforsorg og børn og ung
- Vinnuháskúlin og Sjónám
- Yrkisútbúgvingar
- Miðnám fyri fólk við serligum tørvi
- Serviðgerð uttanlands
- Diabetisverkætlanin

Av raðfestingum innan løguøkið kunnu nevnast:

- Skúladepilin við Marknagil
- Landssjúkrahúsið
- Viðareiðistunnilin
- Bústovnar
- Nólsoyarferja

### Nýggjar inntøkur

Av nýggjum inntøkum í fíggjarlógaruppskotinum 2014 kunnu nevnast:

- Samgongan er samd um at leingja tilfeingis-/loyvisskattin til at vera galdandi fyri 2014, og ætlanin er at hækka skattaprosentið fyri 2014 upp í 7% av skattskyldugu inntøkuni omanfyri 1 mió. kr. Roknað verður við inntøku á 63 mió. kr. í 2014.
- Samgongan er samd um at leggja avgjald á silda- og makrelfiskiskapin eisini í 2014. Av tí at samráðingarnar enn ikki eru lidnar, er ógreitt, hvussu stórar silda- og makrelkvoturnar verða næsta ár. Tí ber ikki til at siga enn, hvussu avgjøldini verða. Avgjørt er tí, í fyrsta umfari, at leingja galdandi lóg, og síðani at áseta endaligu avgjøldini, tá ið greiða er fingin á, hvussu stórar kvoturnar verða næsta ár. Í 2014 verður roknað við inntøku á 107 mió. kr.

### Inntøkur landskassans í 2014

Inntøkurnar eru mettar til 4.611 mió. kr. Harav eru inntøkur frá skattum 2.139 mió. kr. Avgjøld og tollur eru 1.823 mió. kr. Heildarveiting er 635 mió. kr. Talvan niðanfyri vísir inntøkurnar í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2014.

**Meting av inntøkum landskassans í 2013 og 2014**

| *mió. kr.* | **R-2012** | **FL-2013** | **Meting 2013** | **FL-2014** | **Munur (%)** |
|---|---|---|---|---|---|
| Rentur av skuld | -141 | -122 | -138 | -113 | 18,1% |
| Rentuinntøkur o.tíl. | 96 | 76 | 23 | 36 | 56,5% |
| Skattainntøkur | 1.938 | 2.007 | 1.969 | 2.139 | 8,6% |
| Avgjøld og tollur | 1.818 | 1.988 | 1.940 | 1.970 | 1,5% |
| Ymsar inntøkur | 33 | 57 | 59 | 92 | 55,9% |
| Flyting frá øðrum greinum | -144 | -145 | -147 | -147 | 0,0% |
| Heildarveiting o.t. | 624 | 632 | 632 | 635 | 0,5% |
| **Tilsamans** | **4.224** | **4.492** | **4.339** | **4.611** | **6,3%** |

## Útreiðslur landskassans í 2014

Rakstrar-, løgu- og útlánsútreiðslur (netto) verða mettar til 4.861 mió. kr. Harav eru rakstrarútreiðslurnar 4.566 mió. kr., løguútreiðslurnar eru 295 mió. kr., og rentuútreiðslurnar eru 77 mió. kr. Talvan niðanfyri vísir útreiðslurnar.

**Meting av útreiðslum landskassans í 2013 og 2014**

| *mió. kr.* | R-2012 | FL-2013 | Meting 2013 | FL-2014 | Munur (%) |
|---|---|---|---|---|---|
| Rakstur | 4.375 | 4.478 | 4483 | 4.566 | 1,9% |
| Rentur, netto | 45 | 66 | 115 | 77 | -33,0% |
| Løgur | 183 | 258 | 305 | 295 | -3,3% |
| **Tilsamans** | **4.603** | **4.802** | **4.903** | **4.938** | **0,7%** |

## Løgur í 2014

Løgukarmurin í fíggjarlógaruppskotinum 2014 er 295 mió. kr., men umframt hetta er heimild at brúka 115 mió. kr. av løgujáttanum í 2014 frá eldri árum. Talvan niðanfyri vísir, hvussu løgukarmurin á 295 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2014 er raðfestur.

| **Løguætlanin fyri 2014** ***(mió. kr.)*** | |
|---|---|
| **Løgur § 1 - § 15 tilsamans** | **295.250** |
| **§ 2 Løgmansfyrisitingin** | **3.000** |
| Umbygging í Tinganesi | 3.000 |
| **§ 6 Vinnumálaráðið** | **14.900** |
| SSL - dokking v.m. | 1.400 |
| SSL - skúvoy | 3.500 |
| SSL - nýtt skip | 10.000 |
| **§ 7 Mentamálaráðið** | **108.000** |
| Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy | 11.000 |
| Tekniski skúli í Klaksvík | 10.000 |
| Skúladepil við Marknagil | 85.000 |
| Søla av bygningum | 0 |
| Hvalastøðin við Áir | 1.000 |
| Kirkjubømúrurin | 1.000 |
| **§ 11 Heilsumálaráðið** | **39.000** |
| Medicoteknisk tól | 9.000 |
| Landssjúkrahúsið | 25.000 |
| Klaksvíkar sjúkrahús | 5.000 |

| | |
|---|---|
| **§ 12 Almannamálaráðið** | **32.250** |
| Sambýlið fyri sálarsjúk Tórshavn | 2.700 |
| Vardir bústaðir í Eysturoynni í Norðoyggjum | 20.300 |
| Ungdómspensjónat | 3.300 |
| Sambýli til autistar og menningartarnað í Sandoy | 5.950 |

| | |
|---|---|
| **§ 15 Innlendismálaráðið** | **98.100** |
| | |
| **Annað tilsamans** | **25.000** |
| Umvæling av almennum bygningum | 25.000 |
| | |
| **Nýggir landsvegir** | **59.900** |
| Dagføring av brúm, tunlum og vegum | 4.000 |
| Trygdartiltøk | 6.000 |
| Vegagerð í Kallsoy, vegir og tunlar | 3.000 |
| Ferðsluætlan Vágar | 5.000 |
| Søla av jørð til kommunur | -100 |
| Tunnil til Viðareiðis | 37.500 |
| Í oyrunum - Toftir | 1.000 |
| Undir Valaknúkum - Undir Gøtueiði, breiðkan | 3.500 |
| | |
| **Havnir** | **2.200** |
| | |
| **Undirsjóartunlar** | **11.000** |
| Sandoyartunnilin | 5.000 |
| Skálafjarðartunnilin, fyrireiking til útbjóðing | 6.000 |

| | |
|---|---|
| **Løgur § 1 - § 15 tilsamans** | **295.250** |

## Játtanareftirlit í fíggjarárinum 2013

Í játtanarskipanini er ásett, at saman við fíggjarlógaruppskotinum skal greiðast frá játtanareftirlitinum í fíggjarárinum. Her verður greitt frá játtanarligu støðuni samanlagt og fyri hvørja grein sær. Eisini verður víst eitt yvirlit yvir hvørjar játtanir (høvuðskontur), ið hildnar verða fara at víkja frá upprunaligu játtanini, tá ið árið er farið.

**Meting av úrsliti landskassans í 2013 samanborið við fíggjarlógina fyri 2013**

| *1.000 kr.* | FL-2013 | Meting 2013 | Frávik | Frávik (%) |
|---|---|---|---|---|
| Inntøkur | 4.492.290 | 4.339.428 | -152.862 | -3,4% |
| Útreiðslur | 4.735.555 | 4.788.050 | 52.495 | 1,1% |
| **RLÚ 1-úrslit** | **-243.265** | **-448.622** | **-205.357** | **-84,4%** |
| Serinntøkur á §§ 53 til 56 | 160.000 | 174.800 | 14.800 | 9,25% |
| **RLÚ 2-úrslit** | **-83.265** | **-273.822** | **-190.557** | **-228,9%** |

Í talvuni omanfyri er víst RLÚ 1-úrslit fyri greinarnar § 1 til § 20 (vanligir postar). Aftrat hesum koma serinntøkur á § 53 á 160 mió. kr. (avtøka av Landsbankanum) og á § 55 á 8,2 mió. kr. (niðurlaðing av Búnaðargrunninum) og á § 56 á 6,6 mió. kr. (niðurlaging av Vinnuframagrunninum). Serinntøkurnar á §§ 53 til 56 eru vístar í talvuni omanfyri. RLÚ 2-úrslitið, t.e. við serinntøkum á greinunum §§ 53 til 56, verður væntandi -274 mió. kr. í 2013.

Mett verður, at inntøkur landskassans í 2013 verða samanlagt 4.339 mió. kr., meðan útreiðslurnar verða samanlagt 4.788 mió. kr. Hetta er ávikavist 3,4% lægri og 1,1% hægri enn upprunaliga mett í fíggjarlógini fyri 2013. Hetta hevur við sær, at RLÚ 1-úrslitið verður -449 mió. kr.

RLÚ 1-úrslitið hjá landskassanum verður sostatt 205 mió. kr. verri enn upprunaliga fíggjarlógin. RLÚ 2-úrslitið, sum gevur eina betri mynd av fíggingartørvinum hjá landskassanum í árinum, verður væntandi -274 mió. kr. Sum víst verður á niðanfyri, veksur hallið sammett við upprunaligu fíggjarlógina, fyrst og fremst av tí at inntøkurnar í árinum hava víst seg at vera lægri enn mett, umframt at 35 mió. kr. eru brúktar av løgujáttanum, sum eru fluttar frá eldri árum.

## Meting av inntøkum landskassans í 2013 samanborið við fíggjarlógina eftir virksemisøki

| *1.000 kr.* | R-2012 | FL-2013 | Meting 2013 | Frávik | Frávik (%) |
|---|---|---|---|---|---|
| Rentur av skuld | -140.805 | -122.000 | -138.000 | -16.000 | -13,1% |
| Rentuinntøkur o.tíl. | 96.098 | 76.000 | 23.146 | -52.854 | -69,5% |
| Skattainntøkur | 1.937.634 | 2.006.590 | 1.969.340 | -37.250 | -1,9% |
| Avgjøld og tollur | 1.817.877 | 1.988.000 | 1.940.400 | -47.600 | -2,4% |
| Ymsar inntøkur | 33.142 | 56.500 | 59.342 | 2.842 | 5,0% |
| Flyting frá øðrum greinum | -144.442 | -145.000 | -147.000 | -2.000 | -1,4% |
| Heildarveiting o.t. | 624.100 | 632.200 | 632.200 | 0 | 0,0% |
| **Tilsamans** | **4.223.604** | **4.492.290** | **4.339.428** | **-152.862** | **-3,4%** |

Inntøkurnar eru tilsamans 153 mió. kr. lægri enn mett, og hetta stavar serliga frá, at vanligi landsskatturin og meirvirðisgjaldið eru lægri enn mett, umleið 123 mió. kr. tilsamans. Harafturat eru rentuinntøkurnar av innistandandi lægri enn upprunaliga mett orsakað av kursjavnan vegna hækkandi rentustøði. Uppgerðarhátturin, sum brúktur verður til rentuinntøkurnar av gjaldførinum hjá landinum, hevur við sær, at kursjavnan sæst alt fyri eitt, heldur enn at verða javnað yvir livitíðina á virðisbrøvunum. Í karmunum frá mars 2013 er metingin av rentuinntøkunum lækkað til 20 mió. kr. fyri 2013. Metingin er nú umleið 11 mió. kr. fyri 2013.

## Meting av útreiðslum landskassans í 2013 samanborið við fíggjarlógina eftir játtanarslagi

| *1.000 kr.* | FL-2013 | Meting 2013 | Frávik | Frávik (%) |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 132.807 | 145.788 | 12.981 | 9,8% |
| Rakstrarjáttan | 2.923.497 | 2.936.195 | 12.698 | 0,4% |
| Løgujáttan | 258.450 | 304.816 | 46.366 | 17,9% |
| Lógarbundin játtan | 1.420.801 | 1.401.251 | -19.550 | -1,4% |
| **Tilsamans** | **4.735.555** | **4.788.050** | **52.495** | **1,1%** |

Hækkingin í útreiðslunum er tilsamans 53 mió. kr. sammett við upprunaligu játtanina. Hækkingin kemur serliga av, at løgur fyri tilsamans 170 mió. kr. eru fluttar frá eldri árum, og av hesum eru brúktar umleið 35 mió. kr. Hetta er víst í talvuni omanfyri. Løgujáttanin á fíggjarlógini var tilsamans 258 mió. kr., meðan metta nýtslan fyri alt 2013 innan løgujáttanir er umleið 305 mió. kr., við tað at brúkt verður eisini av  løgujáttanum, sum eru fluttar frá eldri árum. Av rakstrarjáttanum er nýtslan størri serliga innan § 11 á høvuðskontuni serviðgerð uttanlands og innan § 12 á høvuðskontuni eldrarøkt. Metta nýtslan innan innan løgujáttanir verður væntandi 46 mió. kr. hægri enn í upprunaligu fíggjarlógini. Hetta stavar sum nevnt í stóran mun frá, at løgujáttanir frá undanfarnum árum verða brúktar, serliga á § 15 (nýggir landsvegir) og á § 7 (Skúladepilin við Marknagil).

**Meting av inntøkum og útreiðslum landskassans í 2013 samanborið við fíggjarlógina eftir grein**

| *1.000 kr.* | | **FL-2013** | **Meting 2013** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|---|
| § 1 | Løgtingið | 45.000 | 45.200 | 200 | 0,4% |
| § 2 | Løgmansfyrisitingin | 49.300 | 49.300 | 0 | 0,0% |
| § 3 | Fíggjarmál | 300.916 | 294.866 | -6.050 | -2,0% |
| § 5 | Fiskivinnumál | 149.900 | 157.740 | 7.840 | 5,2% |
| § 6 | Vinnumál | 327.254 | 341.483 | 14.229 | 4,4% |
| § 7 | Mentamál | 1.002.654 | 1.011.654 | 9.000 | 0,9% |
| § 11 | Heilsumál | 960.382 | 972.645 | 12.263 | 1,3% |
| § 12 | Almannamál | 1.712.724 | 1.711.831 | -893 | 0,0% |
| § 15 | Innlendismál | 187.425 | 203.831 | 16.406 | 8,8% |
| | Útreiðslur tilsamans | 4.735.555 | 4.788.050 | 52.495 | 1,1% |
| § 20 | Inntøkur | 4.492.290 | 4.339.428 | -152.862 | -3,4% |
| | **RLÚ 1-úrslit** | **-243.265** | **-448.622** | **-205.357** | **-84,4%** |

Í talvuni omanfyri eru vístar bæði stuðulsjáttanir, rakstrarjáttanir, løgujáttanir og lógarbundnar játtanir. Verður hugt eftir ymsu greinunum, sæst at serliga §6, § 11 og § 15 víkja frá upprunaligu játtanini á fíggjarlógini, men frávikini stava í størstan mun frá løgum og at brúkt er av løgujáttanum, sum eru fluttar frá eldri árum.

## Rakstrarjáttanareftirlit

Niðanfyri verður hugt nærri eftir, hvussu játtanarliga støðan er á rakstrarjáttanum, stuðulsjáttanum og lógarbundnum játtanum hjá aðalráðunum. Løgujáttanir eru ikki við í talvunum niðanfyri, við tað at serstakt løgujáttanareftirlit er í frágreiðingin eftir rakstrarjáttanareftirlitið.

## § 1 Løgtingið

**Játtanarliga støðan í september 2013**

| **Høvuðs-Konta** | **Stovnur/játtan** | **Játtanarslagg** | **Frávik** *(kr.)* | **Viðmerking** |
|---|---|---|---|---|
| 11.1.02. | Eftirløn og bíðiløn til løgtingsmenn | Lógarbundin | 200.000 | Mett frávik |
| **Tilsamans** | | | **200.000** | |

**Meting av útreiðslum í 2013 samanborið við fíggjarlógina fyri 2013**

| *1.000 kr.* | **FL-2013** | **Meting 2013** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Rakstrarjáttan | 39.865 | 39.865 | 0 | 0,0% |
| Lógarbundin játtan | 5.135 | 5.335 | 200 | 3,9% |
| **Tilsamans** | **45.000** | **45.200** | **200** | **0,4%** |

## § 2 Løgmansfyrisitingin

**Meting av útreiðslum í 2013 samanborið við fíggjarlógina fyri 2013**

| *1.000 kr.* | **FL-2013** | **Meting 2013** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 8.000 | 8.000 | 0 | 0,0% |
| Rakstrarjáttan | 38.300 | 38.300 | 0 | 0,0% |
| **Tilsamans** | **46.300** | **46.300** | **0** | **0,0%** |

# § 3 Fíggjarmál

## Játtanarliga støðan í september 2013

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslagg | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 11.1.03. | Fíggjarmálaráðið | Rakstur | -125.000 | Eykajáttan samtykt í mai |
| 11.1.36. | Sáttmálaviðurskifti | Rakstur | 200.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 15.1.04. | TAKS | Rakstur | 1.700.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 15.1.07. | Føroya gjaldstova | Rakstur | -955.000 | Eykajáttan samtykt í mai |
| 15.1.13. | Búskaparráðið | Rakstur | -820.000 | Eykajáttan samtykt í mai |
| 15.2.01. | Hagstova Føroya | Rakstur | -350.000 | Eykajáttan samtykt í mai og eykajáttan umbiðin í september |
| 18.1.01. | Tænastumannaeftirlønir | Lógarbundin | 1.700.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 18.1.07. | Eftirlønir innan heilsuverkið | Lógarbundin | -400.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 21.2.01. | Stuðul til flutning og dupult húsarhald | Lógarbundin | 2.000.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 22.4.01. | Stuðul til rentuútreiðslur | Lógarbundin | -9.000.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| **Tilsamans** | | | **-6.050.000** | |

## Meting av útreiðslum í 2013 samanborið við fíggjarlógina fyri 2013

| *1.000 kr.* | **FL-2013** | **Meting 2013** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 200 | 200 | 0 | 0,0% |
| Rakstrarjáttan | 129.766 | 129.416 | -350 | -0,3% |
| Lógarbundin játtan | 170.950 | 165.250 | -5.700 | -3,3% |
| **Tilsamans** | **300.916** | **294.866** | **-6.050** | **-2,0%** |

# § 5 Fiskivinnumál

## Játtanarliga støðan í september 2013

| Høvuðs-Konta | Stovnur/játtan | Játtanarslagg | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 31.1.01. | Tilbúgving á landi | Rakstur | -150.000 | Mett frávik |
| 31.1.06. | Tilbúgving á sjógvi | Rakstur | -500.000 | Mett frávik |
| 31.1.07. | Veðurtænastan | Rakstur | -250.000 | Mett frávik |
| 33.2.10. | Landbúnaðarstuðul | Stuðul | 8.240.000 | Eykajáttan samtykt í september |
| **Tilsamans** | | | **7.340.000** | |

## Meting av útreiðslum í 2013 samanborið við fíggjarlógina fyri 2013

| *1.000 kr.* | FL-2013 | Meting 2013 | Frávik | Frávik (%) |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 13.610 | 21.850 | 8.240 | 60,5% |
| Rakstrarjáttan | 133.790 | 132.890 | -900 | -0,7% |
| Lógarbundin játtan | 2.500 | 2.500 | 0 | 0,0% |
| **Tilsamans** | **149.900** | **157.240** | **7.340** | **4,9%** |

Í sambandi við § 5 skal verða nevnt, at hækkingin á høvuðskontu 33.2.10. (Landbúnaðarstuðul) varð fíggjað við høvuðskontu 33.2.12. (Niðurlaðing av Búnaðargrunninum) á § 55 Serinntøkur, fiskivinnumál.

# § 6 Vinnumál

## Játtanarliga støðan í september 2013

| Høvuðs-Konta | Stovnur/játtan | Játtanarslagg | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 37.2.04. | Endurgjald til skipasmíð | Stuðul | 2.350.000 | Eykajáttan samtykt í mai |
| 37.4.07. | Orkumál | Stuðul | -200.000 | Eykajáttan samtykt í mai og eykajáttan umbiðin í september |
| 37.5.04. | Heilsufrøðiliga Starvsstovan | Rakstur | 879.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 39.1.01. | Semingsmannaskipanin | Rakstur | 200.000 | Eykajáttan samtykt í mai og eykajáttan umbiðin í september |
| 39.4.01. | Barsilsskipan | Rakstur | -1.000.000 | Mett frávik |
| **Tilsamans** | | | **2.229.000** | |

## Meting av útreiðslum í 2013 samanborið við fíggjarlógina fyri 2013

| *1.000 kr.* | FL-2013 | Meting 2013 | Frávik | Frávik (%) |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 20.050 | 22.200 | 2.150 | 10,7% |
| Rakstrarjáttan | 199.454 | 199.533 | 79 | 0,0% |
| Lógarbundin játtan | 83.300 | 83.300 | 0.0 | 0,0% |
| **Tilsamans** | **302.804** | **305.033** | **2.229** | **0,7%** |

# § 7 Mentamál

## Játtanarliga støðan í september 2013

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik (kr.) | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 23.1.31 | Próvtøkur | Rakstur | 500.000 | Eykajáttan samtykt í mai |
| 23.2.03 | Stuðul til fólkaskúlar | Stuðul | -650.000 | Eykajáttan samtykt í mai |
| 23.2.06 | Skúlatilboð til ung við breki | Rakstur | 450.000 | Eykajáttan samtykt í mai og umbiðin í september |
| 23.1.18. | Nám | Rakstur | 1.800.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 23.7.04. | Lestrarstuðul | Lógarbundin játtan | -3.400.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 23.7.05. | Lestrarlán | Stuðul | 500.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 24.4.06 | Kringvarp Føroya | Rakstur | 800.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| **Tilsamans** | | | **0** | |

## Meting av útreiðslum í 2013 samanborið við fíggjarlógina fyri 2013

| *1.000 kr.* | FL-2013 | Meting 2013 | Frávik | Frávik (%) |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 71.057 | 70.907 | -150 | -0,2% |
| Rakstrarjáttan | 739.346 | 742.896 | 3.550 | 0,5% |
| Lógarbundin játtan | 126.751 | 123.351 | -3.400 | -2,7% |
| **Tilsamans** | **937.154** | **937.154** | **0** | **0,0%** |

# § 11 Heilsumál

## Játtanarliga støðan í september 2013

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 11.1.55. | KT-øki | Rakstur | 300.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 20.2.05. | Útbúgving av yngri læknum | Rakstur | -300.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 20.2.08. | Apoteksverkið | Rakstur | -7.500.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| 20.3.04. | Landssjúkrahúsið | Rakstur | 1.560.000 | Eykajáttan í apríl |
| 20.3.15. | Suðuroyar sjúkrahús | Rakstur | 800.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 20.3.19. | Serstakur sjúkrahúsheilivágur | Rakstur | 150.000 | Eykajáttan í apríl |
| 20.3.20. | Serviðgerð uttanlands | Rakstur | 10.300.000 | Eykajáttan í apríl og eykajáttan umbiðin í august |
| 20.3.23. | Umsiting av sjúklingatrygging | Rakstur | -800.000 | Eykajáttan í apríl og eykajáttan umbiðin í september |
| 20.3.24. | Sjúklingatrygging | Lógarbundin | -4.000.000 | Eykajáttan í apríl |
| 21.3.12. | Gigni | Rakstur | 100.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| **Tilsamans** | | | **610.000** | |

## Meting av útreiðslum í 2013 samanborið við fíggjarlógina fyri 2013

| *1.000 kr.* | **FL-2013** | **Meting 2013** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 825 | 825 | 0 | 0,0% |
| Rakstrarjáttan | 894.057 | 898.667 | 4.610 | 0,5% |
| Lógarbundin játtan | 12.700 | 8.700 | -4.000 | -31,5% |
| **Tilsamans** | **907.582** | **908.192** | **610** | **0,1%** |

# § 12 Almannamál

## Játtanarliga støðan í september 2013

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 11.1.26. | Almannamálaráðið | Rakstur | -800.000 | Eykajáttan í mai |
| 21.1.02. | Almannaverkið | Rakstur | 750.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 21.1.06. | KT-heildarskipan | Rakstur | -4.000.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| 21.1.08. | Dugni-skúlin | Rakstur | 200.000 | Eykajáttan í april |
| 21.3.01. | Barnavernd | Lógarbundin | -1.500.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 21.3.05. | Stuðul til uppihaldspening | Lógarbundin | -1.000.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| 21.3.13. | Ættleiðingarstuðul | Lógarbundin | -450.000 | Eykajáttan umbiðin í august |
| 21.6.01. | Serforsorg | Rakstur | 1.159.000 | Eykajáttan í apríl á -241 tús. kr. Eykajáttan umbiðin í august á 1,4 mió. kr. |
| 21.6.04. | Eldrarøkt | Rakstur | 9.900.000 | Eykajáttan í mai á 4,1 mió. kr. Eykajáttan umbiðin í august á 5,8 mió. kr. |
| 21.6.10. | Ansingarsamsýning | Lógarbundin | -2.750.000 | Eykajáttan í mai á -2 mió. kr. Eykajáttan umbiðin í august |
| 21.6.14. | Lán til ellis- og røktarheim í Vági | Stuðulsjáttan | 41.000 | Eykajáttan í april |
| 21.6.20. | Sjóndepilin | Rakstrarjáttan | 100.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 21.7.01. | Vanlig forsorg | Lógarbundin | 5.650.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 21.7.02. | Arbeiðsfremjandi tiltøk | Lógarbundin | -1.000.000 | Eykajáttan umbiðin í august |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 21.8.01. | Fólkapensjón | Lógarbundin | -5.000.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 21.8.05. | Fyritíðarpensjón | Lógarbundin | -1.300.000 | Eykajáttan í mai |
| **Tilsamans** | | | **0** | |

## Meting av útreiðslum í 2013 samanborið við fíggjarlógina fyri 2013

| *1.000 kr.* | **FL-2013** | **Meting 2013** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 13.020 | 13.061 | 41 | 0,3% |
| Rakstrarjáttan | 649.739 | 657.048 | 7.309 | 1,6% |
| Lógarbundin játtan | 1.019.165 | 1.011.815 | -7.350 | -0,7% |
| **Tilsamans** | **1.681.924** | **1.681.924** | **0** | **0,0%** |

# § 15 Innlendismál

## Játtanarliga støðan í september 2013

| **Høvuðs-konta** | **Stovnur/játtan** | **Játtanarslag** | **Frávik** *(kr.)* | **Viðmerking** |
|---|---|---|---|---|
| 11.1.23. | Landsins ognir | Rakstrarjáttan | -800.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 14.1.07. | Endurgjald til brotsverksoffur | Lógarbundin játtan | 700.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 37.4.02. | Umhvørvisstovan | Rakstrarjáttan | -800.000 | Eykajáttan umbiðin í september |
| 38.1.21. | Stuðul til havnir | Stuðulsjáttan | 1.700.000 | Eykajáttan í apríl 800 tús., 900 tús. umbiðin í sept. |
| 38.2.24. | P/F Sandoyartunnil | Stuðulsjáttan | 1.000.000 | Eykajáttan umbiðin í juli |
| **Tilsamans** | | | **1.800.000** | |

## Meting av útreiðslum í 2013 samanborið við fíggjarlógina fyri 2013

| *1.000 kr.* | **FL-2013** | **Meting 2013** | **Frávik** | **Frávik (%)** |
|---|---|---|---|---|
| Stuðulsjáttan | 6.045 | 8.745 | 2.700 | 44,7% |
| Rakstrarjáttan | 99.180 | 97.580 | -1.600 | -1,6% |
| Lógarbundin játtan | 300 | 1.000 | 700 | 233,3% |
| **Tilsamans** | **105.525** | **107.335** | **1.800** | **1,7%** |

# § 20 Inntøkur

## Játtanarliga støðan í september 2013

| Høvuðs-konta | Stovnur/játtan | Játtanarslag | Frávik *(kr.)* | Viðmerking |
|---|---|---|---|---|
| 50.1.01. | Rentur at gjalda | Ógreinað | -16.000.000 | Nýggj meting |
| 50.2.01. | Rentuinntøkur av innistandandi | Ógreinað | -43.000.000 | Nýggj meting |
| 50.2.04. | Aðrar rentur | Ógreinað | -6.000.000 | Nýggj meting |
| 50.2.10. | Útgoldið yvirskot frá Danmarks Nationalbank | Ógreinað | -3.850.000 | Nýggj meting |
| 52.1.01. | Vanligur landsskattur | Ógreinað | -53.000.000 | Nýggj meting |
| 52.1.06. | Kolvetnisskattur | Ógreinað | 25.000.000 | Nýggj meting |
| 52.1.07. | Felagsskattur | Ógreinað | -5.000.000 | Nýggj meting |
| 52.1.08. | Kolvetnisskattur, feløg | Ógreinað | -7.000.000 | Nýggj meting |
| 52.1.09. | Tilfeingis-/loyvisskattur | Ógreinað | 9.500.000 | Nýggj meting |
| 52.1.11. | Kapitalvinningsskattur | Ógreinað | -8.000.000 | Nýggj meting |
| 52.1.13. | Avgjald av kapitaleftirlønum | Ógreinað | -5.000.000 | Nýggj meting |
| 52.1.14. | Skattur av pensjónsinngjøldum | Ógreinað | 15.000.000 | Nýggj meting |
| 52.1.25. | Arvagjøld | Ógreinað | -1.000.000 | Nýggj meting |
| 52.1.27. | Gjald til Heilsutrygd | Ógreinað | -6.650.000 | Nýggj meting |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 52.1.28. | Gjald til barsilsskipan | Ógreinað | -1.100.000 | Nýggj meting |
| 52.2.01. | Meirvirðisgjald | Ógreinað | -70.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.04. | Tollavgjøld | Ógreinað | 2.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.10. | Lønhæddargjald | Ógreinað | -1.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.15. | Avgjald á fiskatilfeingi | Ógreinað | 13.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.16. | Framleiðsluavgjøld | Ógreinað | -1.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.19. | Skrásetingargjald | Ógreinað | 10.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.22. | Vegskattur (vektgjald) | Ógreinað | 2.000.000 | Nýggj meting |
| 52.2.25. | Ferðaavgjald | Ógreinað | -500.000 | Nýggj meting |
| 52.2.28. | Umhvørvisavgjald á smyrjiolju | Ógreinað | -100.000 | Nýggj meting |
| 52.2.30. | Tinglýsingargjald | Ógreinað | -2.000.000 | Nýggj meting |
| 52.3.01. | Útluting frá Fíggingargrunninum frá 1992 | Ógreinað | 3.350.000 | Nýggj meting |
| 52.3.04. | Útluting frá partafeløgum og grunnum | Ógreinað | -6.500.000 | Nýggj meting |
| 52.3.10. | Aðrar inntøkur | Ógreinað | 6.000.000 | Nýggj meting |
| 52.5.01. | Endurrindan av keyps-MVG | Ógreinað | -2.000.000 | Nýggj meting |
| **Tilsamans** | | | **-152.850.000** | |

## Løgujáttanareftirlit

Løgukarmurin er 259 mió. kr. í fíggjarlógini fyri 2013. Harafturat eru 170 mió. kr. fluttar frá undanfarnum árum, umframt at eykajáttanir eru umbidnar fyri 11 mió. kr. (løgujáttanir). Roknað verður við løgunýtslu á 305 mió. kr. í 2013. Samlaða avlopið verður sostatt 135 mió. kr. Av hesum er heimild at flyta 115 mió. kr. til seinni ár. Játtanarliga støðan á ymisku løgujáttanunum er útgreinað niðanfyri.

| *Heiti* (1.000 kr.) | Flutt frá eldri árum | FL 2013 | EyJ 2013 | Játtan í alt 2013 | Mett nýtsla 2013 | Óbrúkt játtan 2013 | Heimild seinni fíggjarár |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Løgmansfyrisitingin** | **43** | **3.000** | **0** | **3.043** | **3.043** | **0** | **0** |
| Umbygging í Tinganesi | 43 | 3.000 | 0 | 3.043 | 3.043 | 0 | 0 |
| **Fiskivinnumál** | **19.469** | **0** | **0** | **19.469** | **0** | **19.469** | **0** |
| Nýtt havrannsóknarskip | 19.469 | 0 | 0 | 19.469 | 0 | 19.469 | 0 |
| **Vinnumál** | **-** | **24.450** | **12.000** | **36.450** | **36.450** | **-** | **-** |
| Granskingarlund | 0 | 0 | 10.000 | 10.000 | 10.000 | 0 | 0 |
| Strandfaraskip landsins | 0 | 24.450 | 2.000 | 26.450 | 26.450 | 0 | 0 |
| **Mentamál** | **87.690** | **65.500** | **0** | **153.190** | **74.500** | **78.690** | **78.690** |
| Tekniski skúli í Klaksvík | 3.931 | 10.000 | 0 | 13.931 | 3.706 | 10.225 | 10.225 |
| Skúladepil við Marknagil | 75.875 | 41.500 | 0 | 117.375 | 63.806 | 53.569 | 53.569 |
| Studentaskúlin, HF, Eysturoy | 0 | 12.000 | 0 | 12.000 | 2.100 | 9.900 | 9.900 |
| Kringvarp Føroya, søla av løgu | 0 | 0 | 10.250 | 10.250 | 10.250 | 0 | 0 |
| Kringvarp Føroya | 0 | 0 | -10.250 | -10.250 | -10.250 | 0 | 0 |
| Tjóðleikhús | 4.999 | 0 | 0 | 4.999 | 3 | 4.996 | 4.996 |
| Hvalastøðin við Áir | 2.776 | 1.000 | 0 | 3.776 | 3.776 | 0 | 0 |
| Kirkjubømúrurin | 94 | 1.000 | 0 | 1.094 | 1.094 | 0 | 0 |
| Ítróttarhøll á Sandoynni | 15 | 0 | 0 | 15 | 15 | 0 | 0 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Heilsumál** | **17.153** | **52.800** | **0** | **69.953** | **64.453** | **5.500** | **5.500** |
| Apoteksverkið | 17.111 | 5.800 | 0 | 22.911 | 22.911 | 0 | 0 |
| Medicoteknisk tól | 0 | 8.000 | 0 | 8.000 | 8.000 | 0 | 0 |
| Landssjúkrahúsið | 42 | 30.000 | 0 | 30.042 | 27.042 | 3.000 | 3.000 |
| Klaksvíkar Sjúkrahús | 0 | 8.000 | 0 | 8.000 | 5.500 | 2.500 | 2.500 |
| Suðuroyar Sjúkrahús | 0 | 1.000 | 0 | 1.000 | 1.000 | 0 | 0 |
| **Almannamál** | **29.107** | **30.800** | **-1.500** | **58.407** | **29.907** | **28.500** | **28.500** |
| Dugni-skúlin | 0 | 400 | 0 | 400 | 400 | 0 | 0 |
| Bústovnar | 29.107 | 30.400 | -1.500 | 58.007 | 29.507 | 28.500 | 28.500 |
| **Innlendismál** | **16.606** | **82.000** | **500** | **99.106** | **96.506** | **2.600** | **2.600** |
| Umvæling av alm. bygningum | 10 | 25.400 | 1.500 | 26.910 | 26.910 | 0 | 0 |
| Umhvørvisstovan, Skógrøktin | 0 | 500 | 0 | 500 | 500 | 0 | 0 |
| Nýggir Landsvegir | 16.256 | 50.500 | -1.800 | 64.956 | 62.356 | 2.600 | 2.600 |
| Havnir | 340 | 4.600 | 800 | 5.740 | 5.740 | 0 | 0 |
| Akstovan | 0 | 1.000 | 0 | 1.000 | 1.000 | 0 | 0 |
| **Løgujáttanir tilsamans** | **170.068** | **258.550** | **11.000** | **439.618** | **304.859** | **134.759** | **115.290** |

Niðanfyri eru nakrar viðmerkingar til einstakar løgujáttanir:

**Vinnumál**
Granskingarlund, eykajáttan veitt í apríl á 10,0 mió. kr.
Strandfaraskip landsins, eykajáttan umbiðin í september á 2,0 mió. kr.

**Mentan**
Tjóðleikhús, átekning umbiðin at fáa heimild at flyta óbrúkta játtan til seinni fíggjarár.

**Almannamál**
Bústovnar, eykajáttan umbiðin í september á -1,5 mió. kr.

**Innlendismál**

Umvæling av almennum bygningum, eykajáttan umbiðin í september á 1,5 mió. kr.

Nýggir landsvegir, eykajáttan veitt í apríl á -800 tús. kr. og eykajáttan umbiðin í september á -1,0 mió. kr.

Havnir, eykajáttan veitt í apríl á 800 tús. kr.